


STARVSLÝSING

# Laborantur til Fiska- og Djórasjúkukanningarstovuna

Søkt verður eftir laboranti til Fiska- og Djórasjúkukanningarstovuna (F&DSK) á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

**Arbeiðsuppgávurnar á F&DSK eru m.a.**

1. at gera sjúkugreining av fiski og djórum við
   - PCR, RT-PCR, Real-time PCR, Real-time RT-PCR og Sekventering
   - Kyknudyrking
   - IFAT
   - ELISA
   - Og øðrum kanningarhættum
2. at kanna reinhaldsprøvar fyri Listeria m. við real-time PCR
3. at kanna Na/K-ATPasu aktivitetin í táknum frá laksasmolti
4. at innkoyra nýggjar kanningarhættir
5. at luttaka í góðskuarbeiði, har málið er at fáa omanfyrinevndu kanningar akkrediteraðar av DANAK
6. at luttaka í granskingarverkætlanum.

**Krøv til útbúgving og førleika**

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir við omanfyri nevndu kanningarhættum og tøkni er ein fyrimunur.

Somuleiðis eru royndir við vanligum telduskipanum og telduskipanir til kanningarstovur sum LIMS ein fyrimunur, eins og royndir við elektroniskum journalskipanum.

Harumframt er tað eitt krav, at tú hevur koyrikort til bil.

Sum persónur vænta vit, at tú ert positiv/positivur, ert nærløgd/nærlagdur og dugir at arbeiða málrættað, bæði sjálvstøðugt og í tøttum samstarvi við onnur á deildini. Tær nógvu og ymisku uppgávurnar á F&DSK krevja, at tú kanst hava fleiri bóltar í luftini uttan at missa yvirlitið, umframt at tú hevur góð evni til at samskifta, bæði í skrift og talu.

**Vit kunnu bjóða**

Eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði, har tú verður ein týðandi partur í menningini á F&DSK, og har tú fært møguleikar at menna teg í arbeiðinum, við skeiðluttøku og aðrari eftirútbúgving.

**Tíð og setanarviðurskifti**

Talan er um fast fulltíðarstarv við setan frá 1. apríl 2008 ella skjótast hareftir. Lønt verður eftir lønarflokki 4 sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. www.lnd.fo.

**Umsókn**

Umsókn við avriti av prógvi, eftirútbúgving, starvsroyndum og møguligum viðmælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin hin 29. februar 2008 kl. 1200.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Debes H. Christiansen, leiðara á F&DSK, ella Peter S. Østergaard, deildarleiðara á F&DSD.

*Á F&DSD starvast 10 fólk. Vit eru skipað í eina eftirlitsdeild (F&DSE) og eina kanningarstovu (F&DSK). F&DSE umsitur djórasjúkulógarverkið, og høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og eftirlit. F&DSK er tilvísingarkanningarstova fyri fiskasjúkur og tekur sær av sjúkugreining og yvirvøku sambært djórasjúkulóggávuni. Vit hava nútímans kanningarstovur við framkomnari útgerð til molekylerbiologiskar, immunologiskar og aðrar kanningar.*

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

DEKKMASTER.FO

…tá ið prísurin eisini er avgerandi!



**18" BMW New 3**
Við 225/40-18 dekkum

Original-look felgur til BMW 3-røðina við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og BMW-búmerkjum.

Fyri settið 9.990,-



**18" New RS4**
Við 225/40-18 dekkum

Original-look felgur til VW/Audi við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og VW/Audi-búmerkjum.

Fyri settið 10.800,-



**Razor Black 18"**
Við summardekkum

Flott 18" felga. Svartlakkerað við poleraðum, breiðum kanti.
Á goymslu til VW/Audi, Seat, Skoda

Fyri settið 9.990,-



**Boston 19"**
Við summardekkum

Sera flott felga í hypersilver.
Á goymslu í 5x112 til VW, Audi, Seat.

Fyri settið 12.900,-

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · tel 227 000







## Volvo S40 til sølu

Sera væl hildin ikki-roykjara bilur. 1.8 bensin 125 hk. Árg. 10/2005, koyrt 25.000 km. Hevur ljós leðursetur, leður róður, leður gearknobb v/alu, alu-panelir, el-spegl, orig. 17" alu-felgur, niðurbl. bakkspegl v/kumpass, klimaanlegg, innbygd barnasetur aftan o.m.a. Er sum nýggjur bæði innan og uttan.

Verður seldur, um hóskandi boð fæst

**Tel 21 19 96 ella kho@post.olivant.fo**